

- Vit eiga at hyggja eftir, hvat framtíðin hevur at bjóða okkum, og vit mugu tora at flyta fótin rætta vegin fyri at fáa sum mest burtur úr, heldur Klæmint Østerø

Mynd: Vilmund Jacobsen

# Oljuútgerðarhavn miðdepil í føroyskari frálandavinnu

**- Ein tann týdningarmesta avbjóðingin hjá okkum í Runavíkar kommunu verður at menna nýggju oljuútgerðarhavnina, sum við tíðini verður miðdepilin innan frálandavinnu í Føroyum. Áhugin fyri økinum er stórur og gerst meira ítøkiligur, nú oljan er vorðin so dýr, sigur Klæmint Østerø, formaður í havnanevndini**

Hann er ungur, bragdligur og væl útbúgvin.

Sum grundútbúgving hevur Klæmint Østerø prógv sum maskinverkfrøðingur, men hann hevur eisini lisið tað, sum á fakmáli verður rópt offshore konstruktión við serfrøði innan flótandi boripallar.

Hann kom upp í kommunalpolitikk á seinasta kommunuvali og gjørdist formaður í havnanevndini hjá Runavíkar kommunu.

Nú FaroExpo stundar til, hava vit prátað við havnanevndarformannin og sett honum spurningi um framtíðina og framtíðarætlanir hjá Runavíkar havn.

### Ídnaðarhavn

Klæmint Østerø sigur seg onga løtu ivast í, at Runavíkar havn í framtíðini verður ídnaðarhavnin í Føroyum fram um aðrar.

- Vit eiga at hyggja eftir, hvat framtíðin hevur at bjóða okkum, og vit mugu tora at flyta fótin rætta vegin fyri at fáa sum mest burtur úr.

Hann vísir á, at stórar broytingar hava verið seinastu árini, sum hava broytt munandi um fyritreytirnar fyri rakstri av havnum í síni heild.

- Gongdin innan flutningsvinnu hevur verið, at feløg eru uppkeypt og onnur hava lagt saman í størri eindir. Hetta hevur ført við sær, at fleiri upp-, og avskipingarhavnir eru niðurlagdar, samstundis sum skipaflutningurin innanoyggja er avloystur av lastvognsflutningi.

Úrslitið er, sigur Klæmint Østerø, at hjá fleiri havnum eru inntøkurnar av havna-og vørugjaldi minkaðar nógv – ella eru vorðnar heilt burtur.

- Vit hava sjálvandi eisini merkt hesa broyting við fallandi inntøkum, men har ein súla kámast burtur, kemur onnur til sjóndar, sum hann tekur til.

### Heildarætlan

Fyri umleið tveimum árum síðani setti havnanevndin í Runavíkar kommunu sær fyri at gera eina heildarætlan – ella ein sonevndan masterplan - fyri Runavíkar havn. Ætlanin fevnir um allar havnirnar í kommununi.

Klæmint Østerø sigur, at henda heildarætlan snýr seg um at lýsa og leggja eina ætlan fyri, hvar teir ymisku aktivitetirnir liggja best í mun til almennu samferðsluætlanina, og hvussu hesi økini skulu byggjast út.

- Fyrsti partur av hesum arbeiði er liðugur, býráðið hevur samtykt at fylgja heildarætlanini og at arbeiða víðari við málinum, leggur hann aftrat.

Ein tann týdningarmesta avbjóðingin hjá Runavíkar kommunu verður at menna eina nýggja oljuútgerðarhavn, sum við tíðini skal verða miðdepilin innan frálandavinnu í Føroyum.

- Áhugin fyri økinum er stórur og gerst meira ítøkiligur, nú oljan er vorðin so dýr, sigur hann.

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

# Ein spennandi tíð fyri framman

**Runavíkar kommuna hevur verið við á messum og ráðstevnum uttanlands og hevur eitt gott samband við teir partar, sum hava áhuga í frálandavinnuni í Føroyum**

Klæmint Østerø, havnanevndarformaður, leggur stóran dent á, at tað framhaldandi verður neyðugt hjá Runavíkar kommunu at ganga á odda fyri at styrkja um tað netverk og røkja teir partar, sum skulu fremja ætlanina við oljuútgerðarhavnini í verki.

Hann vísir á, at næsta ár verður tann mest spennandi leitibrunnurin á føroyska havbotninum boraður.

- Boringin verður mett sum ein avmarkingarbrunnur til fundið Rosebank/Lochnagar, og útlitini at finna olju næsta ár eru tískil betur enn við undanfarnu boringum.

Klæmint Østerø vísir á, at um er so, at olja verður funnin í týðandi nøgdum í føroyska havbotninum, er ógvuliga umráðandi, at vit eru væl fyrireikað til at taka ímóti og at veita vinnuni tær tænastur, sum hon hevur brúk fyri.

### Nýggj havnalóg

Formaðurin í havnanevndini hjá Runavíkar kommunu sigur annars, at fyri føroysku havnirnar er tað alneyðugt, at nýggja havnalógin verður samtykt. Umráðandi er eisini, at kommunurnar sleppa at leggja havnirnar í sjálvstøðug rakstrarfeløg.

- Hetta er ein fyritreyt fyri, at kommunurnar kunnu gera tær íløgur, sum eru neyðugar, sigur Klæmint Østerø.



- Leitiboringin á føroyska havbotninum næsta ár verður hin mest spennandi yvirhøvur, heldur Klæmint Østerø

Mynd: Vilmund Jacobsen

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*